Fróðskaparsetur Føroya

22. februar 2008

# Fundarfrágreiðing til setursráðsfund nr. 2/2008

Dagur og klokkutíð: Hósdagin 21. februar 2008, kl. 13-15.30

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Jóan Pauli Joensen, rektari
Hans Pauli Joensen, vararektari og megindeildarráðsf. fyri NVD
Elin Súsanna Jacobsen, megindeildarráðsf. fyri SSD
Malan Marnersdóttir, megindeildarráðsf. fyri FMD
Rúna Hjelm, setursskrivari
Winny í Pætursastovu, fíggjarleiðari var til staðar undir viðgerðini av máli nr. 3
Eir í Ólavstovu, kunningarráðgevi var til staðar undir viðgerðini av málunum nr. 5 og 6

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 1/2008 setursráðsfundi 17. januar 2008.**
Góðkend

2. **Góðkenning av dagsskrá.**
Góðkend við ískoyti, (avgreiðslumál mál 11.c. og 11.d.)

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarlógarjáttanin 2007.** (J.nr. (3) 10-12-20070002).
Winny í Pætursastovu legði fram fíggjartølini fyri 2007, stemmað av per 20.02.2008. Sambært hesum tølum verður eitt lítið hall, á umleið kr 160.000, í roknskapinum fyri 2007.
Varð tikið til eftirtektar.

4. **Nýggj størv á Fróðskaparsetrinum.** (J.nr. (3) 10-11.01-20070001).
Ætlan varð gjørd fyri fundin t. 22.02.08 við Kristinu Háfoss mentamálaráðharra um útbúgvingar á Fróðskaparsetrinum tey næstu árini.

5. **Framleiðsla av kunningartilfari til lestrarátøk.** (J.nr. (3) 10-70-20070002). Eir í Ólavstovu luttók saman við Setursráðnum í kjakinum um møgulig lestrarátøk fyri Fróðskaparsetrið. Kunningartilfar um útbúgvingarnar á Setrinum manglar. Samtykt varð at gera faldarar við kunning um útbúgvingar á deildunum hvør sær. NVD fremur ta byrjaðu kunningarætlanina við Sendistovuna. Eir í Ólavstovu fyrireikar eitt átak vent móti lestrarvegleiðarum á miðnámsskúlunum og eitt kunningarátak í


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

Miðlahúsinum. Arbeiðið við áhugamyndilinum heldur áfram og miðað verður eftir, at hetta arbeiðið kann verða ein partur av ætlaða starvsfólkatiltakinum. Kunningarráðgevin, setursráðið og setursskrivarin skulu fyrireika hetta arbeiði.

6. **Arbeiðið við Navnaskránni og Skeiðsskránni.** (J.nr. (3) 10-05-20070013). Eir í Ólavstovu greiddi frá arbeiðinum við Navna- og Skeiðsskránni. Ein bólkur er gjørdur, sum endurskoðar heimasíðuna, men av tí at so nógv arbeiði er eftir at leggja upplýsingar inn á heimasíðina, er tørvur á einum fólki í tíðaravmarkaðum starvi til hetta. Samtykt varð at seta eitt fólk á tímabasis at gera hetta arbeiði.

7. **Varðveitsla av uppgávum og próvtøkusvørum. Uppskot til reglur.** (J.nr. (3) 10-46-20070018). *Fundarskjal: Notat AS til setursráðið og uppskot til reglur.*
Reglur fyri varðveitslu av uppgávum og próvtøkusvørum vórðu samtyktar við broytingum.

8. **Reglur fyri samskifti á Fróðskaparsetrinum millum lærarar/starvsfólk og studentar.** (J.nr. (3) 10-00-20070005). *Fundarskjal: Uppskot til reglur.*
Reglur fyri samskifti á Fróðskaparsetrinum millum lærarar/starvsfólk og studentar vórðu samtyktar við broytingum.

9. **University of the Arctic Charter.** (J.nr. (3) 10-02-20070007). *Fundarskjal: Uppskot til "University of the Arctic Charter".* Jóan Pauli Joensen kunnaði um samstarvið í "University og the Arctic Charter". Varð tikið til eftirtektar.

10. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
a. **Fundur á Føroyamálsdeildini 22.1.08.** (J.nr. (3) 10-02-20070002).
Fundarfrágreiðingin frá fundunum á Føroyamálsdeildini var ikki klár, og hon verður tí viðgjørd á næsta setursráðsfundi.
b. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 20.2.08.** (J.nr. (3) 10-01-20070003).
Onki at leggja afturat.

**Avgreiðslumál:**

11. **Próvdómaragóðkenningar at staðfesta.** (J.nr. (3) 10-25-2007001).
a. **Eftir áheitan frá Søgu- og Samfelagsdeildini hevur Mentamálaráðið góðkent Christian Ihlen, cand.mag. í søgu, lærara á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði og Onnu Brimnes, cand.mag. í fólkalívsfrøði, bókavørð og leiðara á Býarbókasavninum í Tórshavn til *Samfelagsfrøði.*** (J.nr. (3) 10-25-20070001).
Staðfest.
b. **Eftir áheitan frá Føroyamálsdeildini hevur Mentamálaráðið góðkent Magnhild Selås, dr.art. i nordisk språkvitskap, fyrstaamanuensis við Høgskolen i Bergen sum próvdómara á Føroyamálsdeildini.** (J.nr. (3) 10-25-20070001).
Staðfest.
c. **Eftir áheitan frá Náttúruvísindadeildini hevur mentamálaráðið góðkent Idu Lykke Fabricius, Ph.D., lektara á Danmarks Tekniske Universitet *Innan kolvetnisjarðfrøði.*** (J.nr. (3) 10-25-20070001).
Staðfest.
d. **Dagførdir próvdómaralistar til nýtt próvdómaraskeið 1.4.2008 – 31.3.2013 eru sendir Mentamálaráðnum til góðkenningar.** (J.nr. (3) 10-25-20070002).

Staðfest.

**12. Góðskrivingar at góðkenna:**

**a. Megindeildarráðið á Søgu- og Samfelagsdeildini mælir til, at góðskrivingar hjá Heina í Skorini 26.10.2006 *Grundskeið í stjórnmálafrøði 5 ECTS* og *Grundskeið í Sosiologi 5 ECTS*, 14.12.2006 *Grundskeið í búskaparfrøði 5 ECTS* og *Altjóða politikkur og altjóða skipan 15 ECTS* verða strikaðar. Í staðin mælir deildin til, at hann fær *Sidefag i samfundsfag (Minor Course in Social Science) 120 ECTS* frá Institut for Statskundskab á Københavns Universitet góðskrivað undir einum við 120 ECTS á B.S.Sc.-útbúgvingini í stjórnmálafrøði.** (J.nr. (3) 10-43.02-20070003).
Góðkent.

**b. Megindeildarráðið á Føroyamálsdeildini mælir til, at Signa Joensen fær *Høvuðsritgerð 22 ECTS* frá Cand.phil.-próvnum góðskrivað fyri *Masterritgerð 40 ECTS* á M.A.-útbúgvingini í føroyskum, sambært Kunngerð nr. 109 frá 6. november 2003 grein 39, stk. 5, sum sigur: "Studentur, sum hevur lokið cand.phil., kann søkja um at fáa høvuðsritgerðina góðkenda sum masterritgerð og at halda fram til master eftir hesi kunngerð".** (J.nr. (3) 10-43.03-20070001).
Góðkent.

**Kunningarmál:**

**13. Mánaðarjavni ultimo desember 2007, 1. ískoytisskeið, nýtsla fyri alt Fróðskaparsetrið 19.502.300 kr = 98,8% av játtanarkarmi uppá 19.749.000 kr.** (J.nr. (3) 10-12-2007002). *Fundarskjal: Fíggjartøl, yvirlit yvir nýtslu.*
Tikið til eftirtektar.

**14. Rektarin hevur sett nevnd at endurskoða samsýningar til leysalærarar og próvdómarar. Í nevndini eru: Knud Simonsen, umboðandi føstu lærararnar á Fróðskaparsetrinum, Lis Mortensen, umboðandi leysalærararnar, Sára Joensen, umboðandi deildarskrivararnar og Winny í Pætursastovu, umboðandi Setursskrivstovuna.** (J.nr. (3) 10-10-20070003).
Tikið til eftirtektar.

**15. Eftir avtalu millum rektaran og Lis Mortensen hevur Hans Andriasar stova hjá Fróðskaparfelagnum hevur fingið høli á miðhæddini í J.C. Svabos gøtu 7.** (J.nr. (3) 10-39-20070001).
Tikið til eftirtektar.

**16. Skeið og seminar:**

**a. The Second Executive Forum "Innovation in higher education – what research agenda is needed?", 29.2.2008 í Berlin.** (J.nr. (3) 10-68-20070012).

**b. NUAS/NUS seminar "Institutional strategies for success in a changing policy context", 5.-6.6.2008 í Reykjavík.** (J.nr. (3) 10-68-20070015).

**c. The Second AICIS (Åland International Institute of Comparative Island Studies) Annual Conference "Islands of Competence: Branding Identities in a Globalized World", 10.-11.6.2008 í Mariehamn.** (J.nr. (3) 10-68-20070012).

**d. Seminar for Senior Academic Leaders "Reframing Leadership in Higher Education 2008", 10.-18.6.2008 í Kolding, Syddansk Universitet skipar fyri.** (J.nr. (3) 10-68-20070012). *Fundarskjal: Kunning frá Syddansk Universitet um seminar fyri universitetsleiðarar.*